VIÐMERKINGAR

# Felagslýsing um samstarv millum Føroyar og skotsku oyggjarnar

FELAGSLÝSING

Annar árligi fundurin millum Føroyar og ráðini fyri skotsku oyggjarnar, Hetland, Orknoyggjar og Suðuroyggjar (á enskum nevndar bæði Western Isles og Outer Hebrides) varð hildin í Suðuroyggjum 7. og 8. september.

Løgmaður og formenninir í teim trimum skotsku oyggjaráðunum umrøddu gongdina í Suðuroyggjum við at fremja í verkum menningarætlan teirra 'At skapa framtíðarinnar lokalsamfeløg' (Creating Communities of the Future), og skiftu orð um mál, har ið Føroyar og skotsku oyggjabólkarnir hava felags áhuga og, hvørjir møguleikarnir eru fyri samstarvi hesum viðvíkjandi.

Fyrst var fundur í ráðnum fyri Suðuroyggjar (Comhairle) saman við umboðum frá ráðleggingarsamtakinum 'Outer Hebrides Community Planning Partnership'. Síðani vitjaðu løgmaður og ráðsformenninir fleiri støð, ið høvdu týdning fyri, at menningarætlanin gerst væleydnað, m.a. Arnish ídnaðarøkið og Lews Castle College, ið er partur av UHI (University of the Highlands and Islands), sum er felags hægri lærustovnur fyri oyggjarnar og hálendisøkið í Skotlandi.

Økini, sum í umrøðuni millum løgmann og ráðsformenninar vórðu hildin at størstan felagsáhuga, eisini við atliti at møguligum samstarvi, vórðu hildin at vera hesi:

- Endurnýggjandi orka
- Kunningar- og samskiftistøkni (KST)/Breiðband - serliga átakið 'Búgv lokalt, arbeið globalt (Live Local Work Global)
- UHI og Fróðskaparsetur Føroya
- Mál og mentan

Teir vóru samdir um at royna at ganga framá í samstarvi hesum viðvíkjandi, og viðvíkjandi øðrum felags áhugamálum til tess at menna búskapin í ymsu oyggjasamfeløgunum, ikki minst við tí fyri eyga at stimbra fólkavøkstur í økjunum.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, segði:

"This was a very useful and interesting visit. I am grateful to the Western Isles for hosting this second annual meeting and giving us such an interesting programme and warm hospitality. We were very impressed with the regeneration strategy 'Creating Communities of the Future' and with the progress being made in implementing it. Clearly Renewable Energy is vital to all the islands groups and it was good to see real, sustainable jobs being created at Arnish. I was personally very interested in the progress being made in ICT and broadband. I am sure we could learn important lessons from Western Isles experience and equally sure that our experience in reviving our language and culture can provide help and guidance to those seeking to do the same for Gaelic. We will be following up on these and other issues ahead on the next meeting in Shetland."

Alex MacDonald, ráðsformaður í Suðuroyggjum, segði:

"It was a great pleasure to welcome the Prime Minister of the Faroes and my fellow island Convenors to this second annual meeting following the initital meeting last year in Torshavn. I believe the visit marked a number of firsts including the first time a Prime Minister has officially visited our islands and the first ever joint meeting of the Comhairle with our Community Planning partners. We discussed the many similarities of our different island groups and the potential to work together in areas of common interest and concern such as attracting population through economic development. I was very impressed by the progress in Faroes in both economic and cultural development over recent years. They have not only grown their economy and population but also revived their language and culture. I believe we can all benefit by learning lessons and look forward to much closer co-operation with our island friends in future."

Steven Hagan, ráðsformaður í Orknoyggjum, segði:

"We work closely with our Scottish Islands colleagues on a wide range of matters of common interest but too seldom do we get the chance to visit each other and see what is happening on the islands. This annual joint meeting with Faroes and the Scottish islands councils provides that chance and we have been very impressed with progress in Western Isles. We will all learn a great deal from this experience and our joint working will be greatly enhanced. For example, we are already working closely to promote the case for enhance grid connections to enable the islands to benefit from renewable energy development. Seeing the kind of impact this can have on jobs and population emphasizes the need for our efforts to be increased."

Sandy Cluness, ráðsformaður í Hetlandi, segði:

"This has been a great chance to learn about common issues and reinforce our already good working relations with other island groups. We in Shetland are also pursuing renewable energy projects and will soon be applying for a major on-shore wind farm similar to those proposed for Lewis. We have benefited greatly from oil revenues and see renewable energy as the long term sustainable way of ensuring our community continues to enjoy those benefits. I firmly believe that the wind farm proposals and other renewable energy developments in the Western Isles can have the same impact as oil had in Shetland. We look forward to working together to promote our islands communities and especially to the third annual meeting that we will host in Shetland next year."

# Føroyar og yvirskot Tjóðbankans

**Hava Føroyar mist sín rættvísa part av yvirskotinum hjá danska Tjóðbankanum gjøgnum mong ár?**

## Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi

Í sambandi við viðgerðina av donsku fíggjarlógini hevur Høgni Hoydal, fólkatingsmaður, nú reist ein fyrispurning um viðurskifti, sum ikki hava verið frammi áður.

Tað snýr seg um føroyska partin av yvirskotinum hjá danska Tjóðbankanum. Føroyar og Grønland eiga part av yvirskotinum hjá danska Tjóðbankanum, eftirsum hann stendur fyri gjaldoyramiðlingini fyri Føroyar og Grønland.

Hetta gevur inntøkur til Tjóðbankan, men hvussu stóran lut eiga Føroyar og Grønland í samlaða yvirskotinum hjá danska Tjóðbankanum?

Lógin á økinum viðvíkjandi Føroyum er frá 1949 - og síðani tá eru jú stórar kollveltingar hendar í føroyska samhandlinum við onnur lond og í gjaldoyranýtsluni í Føroyum.

Føroyski parturin av yvirskoti danska Tjóðbankans er roknaður út eftir seðlaumfarinum í Føroyum í mun til samlaða seðlaumfarið í Danmark, Grønlandi og Føroyum tilsamans.

Men hvat liggur í tí? Eru tað føroysku pengaseðlarnir, ið bygt verður á? Og hvat er hent síðani elektronisk gjaldsmiðling er vorðin berandi?

Tað kemur nú undan kavi, at grønlendski parturin av yvirskoti danska Tjóðbankans er útroknaður út eftir fólkatalinum í Grønlandi í mun til fólkatalið í Danmark, Føroyum og Grønlandi tilsamans. Hetta er ásett í danskari lóg frá 1985.

Tí fær Grønland ein størri part av yvirskotinum enn Føroyar - í fjør og í ár svarandi til 7-8 milliónir krónur meira um árið.

Vit hava ikki tølini fyri nógv ár aftur í tíðina, men talan kann vera um stórar upphæddir tilsamans hesi árini, sum Føroyar hava fingið minni enn Grønland.

Tá ið útrokningargrundarlagið er so tilvildarligt og ymiskt, so kann eisini spyrjast, um Føroyar og Grønland yvirhøvur fáa sín rættvísa part av yvirskoti danska Tjóðbankans í mun til tað, sum vit í veruleikanum geva til inntøkurnar hjá danska Tjóðbankanum. Føroyar og Grønland útflyta jú ein lutfalsligan sera stóran part av í sínum inntøkugrundarlagi, og tað átti at givið lutfalsliga stórar valutainntøkur til Tjóðbankan.

Tí hevur Høgni Hoydal sett skrivliga fyrispurning um hetta til danska Fíggjarmálaráðharran, Thor Pedersen.

Spurningurin skal svarast innan 10 yrkadagar.

# Umboð fyri Føroya Lívstrygging siga ósatt

**Føroya Arbeiðarafelag**



Farna leygardag helt S&K felagið eykaaðalfund og vit hava frætt, at Heini Lützen vegna Føroya Lívstrygging greiddi frá lívstryggingarskipanini, sum teir kundu bjóða føroyskum fakfelagslimum og í hesum sambandi kom hann inn á lívstryggingarskipanina, sum Føroya Arbeiðarafelag fyri nógvum árum síðani teknaði í danska tryggingarfelagnum ALKA.

Heini Lützen segði á fundinum, at orsøkin til, at Føroya Arbeiðarafelag teknaði samhaldsføstu lívstryggingina fyri limir sínir hjá danska tryggingarfelagnum ALKA var at royna einkarrættarstøðuna hjá Føroya Lívstrygging og Tryggingarfelagnum Føroyar.

Tað, sum Heini Lützen her hevur ført fram er púrasta burturvið og tikið úr leysum lofti, tí orsøkin til at Føroya Arbeiðarafelag valdi at tekna samhaldsføstu lívstryggingarskipan sína hjá tryggingarfelagnum ALKA var, at hetta tryggingarfelag kundi bjóða felag okkara nógv betur treytir enn Føroya Lívstrygging kundi bjóða.

Fyri tað fyrsta var og er umsitingargjaldið hjá tryggingarfelagnum ALKA nógva ferðir lægri enn tað, sum Føroya Lívstrygging áleggur sínum viðskiftafólki.

Hetta var sjálvandi ein rættiliga avgerandi spurningur fyri felag okkara, tí jú lægri umsitingargjaldið er, jú størri verður upphæddin, sum eftir er til limirnar bæði tá talan er um eftirlønarskipan og lívstryggingarskipan.

Sum kunnugt hevur Føroya Lívstrygging, í hvussu so er til fyri nøkrum fáum árum síðani, álagt viðskiftafólkum sínum umsitingargjald, sum er heili 11%.

Fyri at samanbera við umsitingarútreiðslurnar hjá ALKA, so vóru hesar í 2004 2,9% av samlaðu tryggingargjøldunum.

Vit í Føroya Arbeiðarafelag mettu tað sjálvsagt vera okkara skyldu at tekna eina samhaldsfasta lívstrygging hjá einum tryggingarfelag, har limir okkara fingu mest møguligt burturúr, og hetta var uttan mun til, um tryggingarfelagið var heimahoyrandi í Føroyum ella uttanlands. Talan var tí als ikki um eina roynd at royna einkarrættarstøðuna hjá føroysku tryggingarfeløgunum.

Eitt annað, sum vit eisini løgdu avgerandi dent á var, at tryggingarfelagið ALKA kundi bjóða limum okkara eina skipan við útgjaldi í sambandi við ***álvarsliga sjúku,*** meðan Føroya Lívstrygging ikki kundi bjóða okkum somu sømdir.

Tað gingu tó ikki nógv ár, fyrr enn Føroya Lívstrygging kendi seg noyddan til at fylgja gongdini hjá danska tryggingarfelagnum og Føroya Lívstrygging fór tí at bjóða viðskiftafólkum sínum somu skipan við útgjaldi til tryggingartakaran í sambandi við álvarsliga sjúku.

At enda skal viðmerkjast, at Føroya Arbeiðarafelag sjálvsagt ikki fer at leggja seg út í rættin hjá S&K felagnum at skipa fyri eykaaðalfundi við dagsskrá sambært lógum felagsins, men tá umboð fyri Føroya Lívstrygging verður bjóðað til aðalfundin at greiða frá eftirlønar- og lívstryggingarviðurskiftum, so átti tað at verið sjálvsagt, at umboðsmaðurin hjá Føroya Lívstrygging heldur seg til sannleikan og ikki kemur við ósannindum um eina tryggingarskipan, sum hann helst ikki hevur førleika at úttala seg um.